Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Dagfesting:	18/12/2023
Mál nr.:	23/18282
Málsviðgjørt:	uak
Ummælistíð:	15.11.2023 - 29.11.2023
Eftirkannað:	06.12.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kapping
(Eftirlit við prísi við marknaðargreining og nágreining av prosessparti)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2023 um kapping verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 26, stk. 1, verður orðað soleiðis:

"**§ 26.** Tey boð, sum Kappingareftirlitið kann geva eftir § 6, stk. 4, og § 11, stk. 4, við tí endamáli at steðga skaðiligu árinunum frá kappingaravmarkingum og eftir § 29 a, stk. 4, við tí endamáli at steðga framferð ella viðurskiftum, sum virka ímóti kappingini á marknaðinum, kunnu til dømis vera:

1) at avtalur, viðtøkur, handilstreytir o.a. heilt ella lutvíst verða settar úr gildi,
2) at farast kann ikki upp um tilskilaðar prísir ella vinningar, ella at ávísir útrokningarhættir skulu nýtast, tá ið prísir ella vinningar verða roknaðir út,
3) at áleggja einum ella fleiri av viðkomandi fyritøkunum at selja til tilskilaðar keyparar við teimum treytum, sum fyritøkan vanliga setir fyri samsvarandi sølu. Fyritøkan kann tó altíð krevja, at goldið verður kontant, ella krevja nóg góða trygd, og
4) at geva atgongd til fasilitet í undirstøðukervi, ið er neyðugur til tess at kunna bjóða út eina vøru ella tænastuveiting."

2. § 27, stk. 1, verður orðað soleiðis:

"**§ 27.** Tilsøgn, veitt av fyritøku, og sum gongur ivasemi á møti, sum Kappingareftirlitið hevur viðvíkjandi § 6, stk. 4, § 11, stk. 4 og § 29 a, stk. 1, kann gerast bindandi fyri fyritøkurnar Ein tilsøgn kann gerast tíðaravmarkað."

3. Aftan á § 29 verður sett:

"**§ 29 a.** Kappingareftirlitið kann fara undir at greina ein marknað, tá ið ábendingar eru um, at framferð ella

viðurskifti á einum marknaði forða fyri, avlaga ella hava aðra skaðiliga ávirkan á kappingina. Hetta kann til dømis vera høgir prísir, høgur vinningur, høg miðsavning, avmarkað atgongd at koma inn á ein marknað o.a.
Stk. 2. Ásetingarnar í § 28, stk. 1 og 2, eru somuleiðis galdandi fyri marknaðargreiningar eftir stk. 1.
Stk. 3. Kappingareftirlitið kann almannakunngera slíka greining, tó við teimum avmarkingum, ið eru nevndar í § 22, stk. 4.
Stk. 4. Um marknaðargreining sambært stk. 1 vísir, at tað á viðkomandi marknaði er framferð ella viðurskifti, sum virka ímóti kappingini á marknaðinum, kann Kappingareftirlitið geva boð sambært § 26.
Stk. 5. Ásetingarnar í § 27, stk. 1-3 eru somuleiðis galdandi fyri marknaðargreiningar eftir stk. 1.“

4. § 33, stk. 3, verður orðað soleiðis:

“*Stk. 3.* Avgerð, tikin av Føroya Kærustovni, kann av kæraranum og Kappingareftirlitinum leggjast fyri Føroya Rætt í seinasta lagi 8 vikur frá tí, at avgerðin er kunngjørd tí, sum hon viðvíkur. Verður ikki kært innan ásettu tíðarfreistina, er avgerðin hjá Føroya Kærustovni endalig.”

5. Aftan á § 33, stk. 3, verður sett nýtt stk. 4, sum verður orðað soleiðis:

”*Stk. 4.* Tá ið avgerð sambært stk. 3 verður løgd fyri Føroya Rætt, er Kappingareftirlitið ella fyritøka o.a. rætta viðkomandi at stevna.”

6. § 35, stk. 1, nr. 11, verður orðað soleiðis:

“11) gevur Kappingareftirlitinum, Kappingarráðnum ella Føroya Kærustovni ófullfíggjaðar, skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur um viðurskifti, sum hava týdning fyri mál, kanning ella greining eftir § 29 ella § 29 a, sum upplýsingar verða savnaðar til.”

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Síðani kappingarlógin av fyrstani tíð kom í gildi í Føroyum, hevur eftirlit við matvøruprísum verið bygt á grundreglurnar í lógini um at tryggja og hava eftirlit við kapping eftir marknaðartreytum – tað er við grundarlagi í útboði og eftirspurningi, og at marknaðarstøður ikki verða misnýttar ella prísir og vinningur avtalað. Tó má ásannast, at í einum lítlum marknaðarbúskapi sum tí føroyska eru avbjóðingar við at skapa virkna kapping, sum tryggjar røttu prísirnar fyri brúkaran.

Kappingarlógin hevur sum endamál við virknari kapping at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu til gagns fyri fyritøkur og brúkarar. Kappingareftirlitið hevur við heimild í lógini ávís amboð at gera inntriv í marknaðir við tí endamáli at skapa virkna kapping.

Í mun til príslegu kann Kappingareftirlitið í sambandi við kartellvirksemi ella misnýtslu av ráðandi marknaðarstøðu m.a. geva boð um at farast kann ikki upp um tilskilaðar prísir. Fortreytin fyri at geva slík boð er, at tað frammanundan er staðfest brot á lógina, og hetta kann taka drúgva tíð. Kappingareftirlitið hevur víst á, at tað kunnu vera viðurskifti ella atferð á einum marknaði, sum ikki eru brot á § 6 ella § 11 í kappingarlógini, sum tó forða fyri virknari kapping á einum marknaði.

Í sambandi við uppskotið til samtyktar, t.e. løgtingsmáli nr. 81/2022, um at seta á stovn eitt føroyskt príseftirlit, sum Miðflokkurin við legði fram í vár, varð hugt nærri at kappingarlógini við tí fyri eyga at veita Kappingareftirlitinum fleiri heimildir og víðka um virkisøkið í kappingarlógini til tess at hava betri eftirlit við prísi og betri amboð at regulera møgulig brot.

Uppskotið til samtyktar varð viðgjørt í Vinnunevndini samstundis sum nýggj lóg um kapping, og ein samd Vinnunevnd mælti landsstýrismanninum í vinnumálum at gera ásetingar í lógini um kapping, sum betur enn í dag kunnu tryggja eitt betri eftirlit við prísáseting á marknaðum við avmarkaðari kapping, og har almennar stuðulsskipanir kunnu hava ávirkan á marknaðin og prísáseting. Vinnunevndin mælti til, at hesa broytingar verða framdar í seinasta lagi á heysti 2023.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum hevur síðani arbeitt við at gera broytingar í kappingarlógini, sum kunnu veita Kappingareftirlitinum fleiri heimildir og víðka um virkisøkið í kappingarlógini til at hava betri eftirlit við prísum og betri amboð at regulera skaðiliga atferð ella virksemi á kappingina á einum marknaði.

Betri eftirlit við prísi og kapping eru lutir í at hava betri amboð og átøk í mun til inflasjónina. Innan karmarnar í kappingarlógini er ætlanin at veita Kappingareftirlitinum fleiri heimildir og víðka um virkisøkið í kappingarlógini, tó soleiðis, at ásetingarnar í lógini framvegis eru í samsvari við meginreglurnar um marknaðartreytir fyri prísáseting.

Við hesum verður skotið upp at geva Kappingareftirlitinum heimild til at fremja marknaðargreining til tess forða fyri, at atferð ella viðurskifti á einum marknaði m.a. elva til høgan prís ella høgan vinning.

Lagt verður upp til, at Kappingareftirlitið ikki kann fara undir marknaðargreining uttan so, at ábendingar eru um, at viðurskifti ella framferð á viðkomandi marknaði forða, avlaga ella hava

skaðilig árin á kappingina á einum marknaði. Hetta verður gjørt við atliti at rættartrygdini hjá fyritøkum o.ø.

Somuleiðis verður ásett, at Kappingareftirlitið skal hava víst á, at tað eru viðurskifti ella framferð á marknaðinum, sum eru til ampa fyri kappingina, áðrenn Kappingareftirlitið kann geva boð sambært § 26. Hesi boð kunnu m.a. annað verða, at farast kann ikki upp um tilskilaðar prísir ella vinningar. Boðini sambært § 26 skulu vera hóskandi og rímilig sambært meginregluni um proportionalitet, og samstundis hava fyritøkur o.a. høvi at kæra boð, givin sambært § 26.

Fyritøkur eru ofta sjálvar betur førar fyri at finna røttu loysnirnar, og tí verður ásett, at ein tilsøgn sambært § 27 í kappingarlógini altíð kann latast Kappingareftirlitinum í sambandi við eina marknaðargreining. Verður ein tilsøgn gjørd bindandi, verður marknaðargreiningin vanliga steðgað, uttan at nøkur endalig niðurstøða verður gjørd.

Skotið verður upp, at niðurstøður í marknaðargreiningum ikki kunnu kærast, men at tey boð, sum verða givin, kunnu kærast. Somuleiðis verður skotið upp, at tær niðurstøður, sum verða gjørdar í eini marknaðargreining, fara ikki at føra til revsing, meðan brot á boð ella tilsagnir givnar í sambandi við marknaðargreining kunna revsast við sekt. Mett verður, at tað í nøktandi mun verður tikið atlit at rættartrygdini hjá fyritøkunum o.ø.

Kappingareftirlitið hevur ynskt, at tað verður greitt, hvør er rætti myndugleiki at stevna, tá ið avgerð hjá Føroya Kærustovni verður løgd fyri Føroya Rætt. Kappingareftirlitið er fakligur myndugleiki í kappingarmálum, og skotið verður upp, at tað verður greitt, at Kappingareftirlitið er sokallaði prosessparturin, tá ið avgerð verður løgd fyri Føroya Rætt. Tað merkir, at tá ið kærari, t.e. vanliga fyritøka o.a., leggur avgerð hjá Føroya Kærustovni fyri Føroya Rætt, verður Kappingareftirlitið - og ikki Føroya Kærustovnur - stevnt. Somuleiðis verður lagt upp til, at tá ið Kappingareftirlitið leggur avgerð fyri Føroya Rætt, verður fyritøkan o.a. stevnd.

Tað er Kappingareftirlitið, sum hevur innlit í, hvørjar avleiðingar ein avgerð hevur frameftir í mun til broyttar venjur og siðvenjur. Í Danmark hava myndugleikarnir ásannað henda veruleika og hava tí gjørt greitt, at tað er Konkurrence- og Forbrugerstyrelsen, ið er processpartur, tá ið mál verða løgd fyri rættin. Eisini hóast Konkurrenceankenævnet hevur tikið avgerð í málinum.

1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi lóg er løgtingslóg nr. 72 frá 22. mai 2023 um kapping.

Tað kunnu vera viðurskifti ella atferð á einum marknaði, sum ikki eru brot á § 6 ella § 11 í kappingarlógini, men sum kortini forða fyri virknari kapping, og at møguleikin at seta í verk tiltøk at stimbra virkna kapping er avmarkaður í § 29.

Í sambandi við rættarmál er óvist, hvør rætti myndugleiki er at stevna.

§ 33, stk. 3, í kappingarlógini er soljóðandi:

Avgerð, tikin av Føroya Kærustovni, kann leggjast fyri Føroya Rætt í seinasta lagi 8 vikur frá tí, at avgerðin er kunngjørd tí, sum hon viðvíkur. Verður ikki kært innan ásettu tíðarfreistina, er avgerð hjá Føroya Kærustovni endalig.

Og § 15 í lóg um Føroya Kærustovn, t.e. løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn, er soljóðandi:

Um ikki annað er ásett í aðrari lóggávu, kunnu avgerðir hjá Føroya Kærustovni skjótast inn fyri Føroya Rætt innan 6 mánaðir eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at útvega Kappingareftirlitinum fleiri amboð at fremja virkna kapping. Við hesum verður givin Kappingareftirlitinum heimild at fremja marknaðargreiningar t.d. tá ið ábendingar eru um, at kappingin á einum marknaði ikki virkar, sum m.a. kann vísa seg við høgum prísum ella høgum vinningi.

Í § 29 í kappingarlógini er heimild at gera kanningar innan ávísa vinnugrein ella marknaðir. Fyri at byrja eina kanning sambært § 29 er tað ikki eitt krav, at Kappingareftirlitið frammanundan kann staðfesta álvarsamar kappingarligar trupulleikar. Gáttin at gera kanningar sambært § 29 er sostatt lægri enn í § 29 a.

Við áseting um marknaðargreining í nýggjari § 29 a, fær Kappingareftirlitið heimild at gera marknaðargreiningar. Umframt fær Kappingareftirlitið heimild at enda mál við tilsøgn sambært § 27 og geva boð sambært § 26, sum ikki ber til í dag sambært § 29. Av tí, at Kappingareftirlitið fær hesar heimildir, hóast talan ikki er um brot á §§ 6 ella 11, er krav um, at ábendingar skulu vera um, at virkin kapping ikki er á marknaðinum, áðrenn Kappingareftirlitið kann fara undir eina marknaðargreining.

Eisini verður skotið upp at gera greitt, at Kappingareftirlitið er rætti myndugleiki at stevna, tá ið avgerð hjá Føroya Kærustovni verður løgd fyri Føroya Rætt.

Kappingareftirlitið er kappingarmyndugleiki í Føroyum, og við hesum verður greitt, at Kappingareftirlitið er sokallaði prosessparturin, tá ið avgerð verður løgd fyri Føroya Rætt. Tað merkir, at tá ið kærari, t.e. vanliga fyritøka o.a., leggur avgerð hjá Føroya Kærustovni fyri Føroya Rætt, verður Kappingareftirlitið - og ikki Føroya Kærustovnur - stevnt. Somuleiðis verður lagt upp til, at tá ið Kappingareftirlitið leggur avgerð fyri Føroya Rætt, verður fyritøkan o.a. stevnd.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Nýskipanin við hesum uppskoti til broyting í kappingarlógini er, at Kappingareftirlitið fær heimild at fremja marknaðargreiningar á marknaðum, har ábendingar eru um, at kappingin ikki virkar sum hon skal, sum m.a. kann vísa seg við høgum prísum ella høgum vinningi. Fyri at fremja kappingina á marknaðinum kann fyritøka o.a. geva Kappingareftirlitinum tilsøgn, sum Kappingareftirlitið kann gera bindandi. Kappingareftirlitið fær eisini heimild at geva boð sum t.d. at farast kann ikki upp um tilskilaðar prísir ella vinningar.

Í uppskotinum verður eisini gjørt greitt, at Kappingareftirlitið er rætti myndugleiki at stevna, tá ið avgerð hjá Føroya Kærustovni verður løgd fyri Føroya Rætt.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskot til broyting í lóg um kapping hevur verið til ummælis hjá Brúkaraumboðnum, Hugskotinum, Kommunufelagnum, TAKS, øllum stjórnarráðunum, Vinnuframa og Vinnuhúsinum.

Uppskotið til broyting hevur verið til ummælis 15. november 2023 til 29. november 2023.

Almanna- og mentamálaráðið hevur boðað frá, at tey hava ikki viðmerkingar til uppskotið. Vinnuhúsið, fylgiskjal 1, hevur latið inn ummæli.

Vinnuhúsið vísir á, at einki bendir á, at tær príshækkingar, sum serliga hava verið síðani 2021, eru íkomnar orsakað av øktum vinningi hjá føroysku handlunum. Tvørturímóti hevur føroyska handilsvinnan havt trupult við at taka hædd fyri skjótt hækkandi prísunum frá veitarunum.

Vinnuhúsið vísir á, at á heimasíðuni hjá Hagstovuni verða roknskaparhagtøl fyri vinnugreinar uppgjørd. Um hugt verður eftir gongdini, síðani inflatiónin tók dik á seg, sæst, at nettomarginurnar eins og EBITDA-marginurnar í handilsvinnuni eru lækkaðar frá 2021 til 2022. Hetta er bæði galdandi fyri handilsvinnuna sum heild, og fyri tann partin, sum fæst við smásølu av øðrum enn motorakførum (herundir matvørur).

Vinnuhúsið mælir tí til, at tað í viðmerkingunum verður grundgivið nærri og ítøkiliga fyri tørvinum á nýggjari lóggávu í mun til inflatiónina, ikki minst, tá ið uppskotið hevur við sær eyka starvsfólk og umsitingarkostnað hjá Kappingareftirlitinum. Eisini skal vísast á, at tað sum heild er virkin kapping millum matvøruhandlarnar í Føroyum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal vísa á, at lógaruppskotið er amboð hjá Kappingareftirlitinum at greina marknaðir, soleiðis at tað ber til at kanna nærri, hvussu ein ávís príslega hongur saman. Ein marknaðargreining kann sostatt staðfesta, at príshækkingar á einum marknaði ikki skyldast øktum vinningi. Vísir ein marknaðargreining hinvegin, at tað er øktur vinningur, virksemi ella onnur atferð á einum marknaði, sum hevur skaðiliga ávirkan á kappingina, so hevur Kappingareftirlitið heimild at fara inn – í fyrstu atløgu saman við fyritøkunum o.ø. – at gera ábøtur og seta tiltøk í verk til tess at skapa ella endurskapa virkna kapping.

Vinnuhúsið vísir eisini á, at í lógaruppskotinum stendur einki um, at marknaðargreiningar eftir § 29 a skulu sendast til viðmerkingar hjá teimum umfataðu fyritøkunum. Vinnuhúsið tekur tað sum givið, at ætlanin er at gera hetta, serliga tá ið innihaldið í marknaðargreiningini ikki kann kærast. Vinnuhúsið vísir á, at tað átti tó at verið skrivað í viðmerkingarnar til lógaruppskotið.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við viðmerkingunum hjá Vinnuhúsinum og hevur sett í serligu viðmerkingarnar til § 29 a, at marknaðargreiningar verða latnar fyritøkum o.ø. til viðmerkingar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
At fremja munagóðar marknaðargreiningar verður mett at krevja eitt ársverk, sum er áleið 800.000 kr. Í sambandi við uppskotið verður tí lagt upp til, at jattanin til Kappingareftirlitið verður økt við einum ársverki. Ætlanin er at útvega fígging í eykajáttanarlóg.

Lógaruppskotið hevur ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
At fremja munagóðar marknaðargreiningar verður mett at krevja eitt ársverk, sum er áleið 800.000 kr. Í sambandi við uppskotið verður tí lagt upp til, at Kappingareftirlitið verður styrkt við einum ársverki.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið víðkar heimildirnar hjá Kappingareftirlitinum mótvegis vinnuni. Mett verður tí, at uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna. Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Tað eru ikki millumtjóðasáttmálar, ið eru viðkomandi fyri lógaruppskotið.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Mett verður, at lógaruppskotið er í samsvari við Hoyvíkssáttmálan (Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin), Evropeiska mannarættindasáttmálan, sambært anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneskerettighedskonvention, og Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, sambært bekendtgørelse nr. 35 af 15. september 2006 om rettigheder for personer med handicap.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum. Mett verður ikki, at lógaruppskotið fer at elva til markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið gevur Kappingareftirlitinum heimild at geva fyritøkum o.ø. boð, um ein marknaðargreining vísir, at atferð ella viðurskifti á einum marknaði eru til ampa fyri virkna kapping á einum marknaði.

Brot á boð frá Kappingareftirlitinum kann føra til revsing við sekt sambært §§ 34 og 35 í galdandi lóg um kapping.

§ 34 gevur Kappingareftirlitinum heimild at geva vikuliga sekt, um upplýsingar ikki verða latnar ella tilsøgn ikki verður fylgd.

§ 34, stk. 2, gevur Kappingareftirlitinum heimild til at innheinta sekt við panting og innkrevjingarkostnaði. Taks fremur pantingina sambært lóg um innkrevjing av skattum, t.e. løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt.

Í § 35 í lóg um kapping er ásett, at brot á tey viðurskifti nevnd í nr. 1-11, sum verða framd tilætlað ella av grovum ósketni, og har harðari revsing ikki er uppiborin eftir aðrari lóggávu, verða revsað við sekt.

Til tess at kappingarmyndugleikin kann gera rættar niðurstøður í mun til sítt kanningararbeiði og greiningararbeiði er umráðandi, at tær upplýsingar, sum kappingarmyndugleikin innheintar, eru rættar.

Við ásetingini verður tann, sum tilætlað ella av grovum ósketni gevur kappingarmyndugleikanum ella Føroya Kærustovni skeivar ella villleiðandi upplýsingar ella tigur um viðurskifti, sum hava týdning fyri mál, kanningar ella greiningar eftir § 29 ella § 29 a í kappingarlógini, revsaður.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld, so sum nýtslugjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið leggur ikki skyldur á likamligar ella løgfrøðiligar persónar.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið verður ikki mett at hava aðrar avleiðingar enn tær, ið eru nevndar omanfyri.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei

Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1, nr. 1

§ 26, stk. 1
Í § 26, nr. 1-4 verða ásett tey boð, sum Kappingareftirlitið kann geva sambært § 6, stk. 4 og § 11, stk. 4, við tí endamáli at steðga skaðiligum árinum av eini kappingaravmarking og § eftir 29 a, stk. 4.

Treytað av, hvussu kappingaravmarking er háttað, og hvørja ávirkan hon hevur, má ítøkilig støða takast til, hvussu kappingaravmarkingin hóskandi kann verða steðgað. Boðini í nr. 1-4 eru ikki úttømandi viðvíkjandi møguleika Kappingareftirlitsins at leggja upp í við boðum.

§ 26, nr. 1
Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum at geva boð um, at avtalur, viðtøkur, handilstreytir o.a. fult ella lutvíst verða settar úr gildi. Til tess at steðga einum broti, skal ein fyritøka ikki bert seta úr gildi kappingaravlagandi avtaluna o.tíl., men skal somuleiðis de-facto steðga við at fylgja avtaluni o.a.

§ 26, nr. 2
Heimild, at geva boð um, at ikki kann verða farið upp um ásettar prísir ella vinningar, er ásett í § 26, nr. 2. Tann gjøllari ásetingin av prísum ella vinningum má fara fram við einari tilhugsaðari meting av viðurskiftunum, sum tey høvdu verið á einum marknað við kapping. Eitt veruligt prógv fyri, hvussu prísurin ella vinningurin hevði verið, kann sostatt ikki verða kravt, men kravt verður, at hetta verður gjørt sannlíkt.

Boð kunnu verða givin soleiðis, at prísir og vinningar verða ásettir, og at ikki kann verða farið upp um hesar, ella at ávísar útrokningarreglur verða nýttar, tá ið prísir og vinningar verða útroknaðir. Við hesum verður miðað ímóti størst møguligum smidleika í sambandi við boð viðvíkjandi prísum og vinningum, har prísjavning framhaldandi kann vera gjørd soleiðis, at fyritøkurnar o.a. fáa møguleika til og verða eggjaðar til at betra um virkisførið.

§ 26, nr. 3
Eftir § 26, nr. 3 kann ein fyritøka fáa boð um at selja til nærri tilskilaðar keyparar við teimum treytum, sum fyritøkan vanliga setir fyri samsvarandi sølu. Fyritøkan kann tó altíð krevja, at goldið verður í reiðum peningi ella krevja samsvarandi trygd.

§ 26, nr. 4
Í § 26, nr. 4 verður givin heimild um, at triðipartur skal hava atgongd til verandi undirstøðukervi, tá ið hetta er neyðugt, til tess at kunna bjóða út eina vøru ella tænastuveiting. Talan kann t.d. verða um atgongd til eitt elnet, eina havn ella flogvøll. Heimildin at geva boð um at geva triðjaparti atgongd til undirstøðukervið, fevnir einans um tey føri, har fyritøkur, ið eru møguligir kappingarneytar, eru forðaðar í sjálvar at byggja upp neyðugu hentleikarnar.

Til § 1, nr. 2

§ 27, stk. 1

Við ásetingini verður heimild givin til, at Kappingareftirlitið endar eitt mál við at geva tilsøgn, sum fyritøkur hava latið bindandi – varandi ella tíðaravmarkað.

Í hesum sambandi samráðast partarnir, sum ger tilgongdina smidliga, skjóta og orkusparandi. Tað er ein fyrimunur, at fyritøkurnar hava ein virknan leiklut at finna loysnir á trupulleikunum, sum atferðin ella viðurskiftini hava við sær.

Fyritøkur hava stórt innlit í marknaðarviðurskifti og teirra egnu fíggjarligu støðu, og tí er tað oftani møguligt at finna fram til loysnir, sum betur loysa ítøkiligu ivamálini. At enda eitt mál við tilsøgn er framlítandi við lyftum um, hvat skal gerast ella ikki gerast frameftir. Kappingareftirlitið kann góðtaka tilsagnir, sum steðga kappingaravmarkandi atferð ella virksemi o.ø., og sum skapar ella endurskapar virkna kapping ella á annan hátt røkkur endamálinum við lógini um við virknari kapping at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu.

Brýtur ein fyritøka eina tilsøgn, sum er bindandi, kann fyritøkan verða revsað við sekt sambært § 35, stk. 1, nr. 8. Um ein fyritøka ikki fylgir einari tilsøgn, sum er bindandi, kunnu áleggjast dagligar ella vikuligar bøtur sambært § 34, stk. 1.

Hevur ein fyritøka givið tilsøgn, og hevur Kappingareftirlitið endað sakina við at gera tilsøgnina bindandi, kann fyritøkan ikki kæra til Kærustovnin. Hetta er ein avleiðing av, at fyritøkan við samráðing sjálv hevur funnið fram til eina loysn. Tað er hvørki orkusparandi ella fremjandi fyri kappingina, at ein fyritøka fær møguleikan at enda eitt mál við tilsøgn, um fyritøkan samstundis kann átala hesa avgerð, sum fyritøkan sjálv hevur luttikið í saman við kappingarmyndugleikanum, og sum er gjørd bindandi fyri fyritøkuna. Tó er tað bert møguleikin at leggja eitt mál til Føroya Kærustovn, sum verður avmarkaður. Fyritøkan kann framvegis kæra avgerð um lógarbrot.

Til § 1, nr. 3

§ 29 a, stk. 1
Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum at gera marknaðargreiningar av marknaðum.

Endamálið við eini marknaðargreining er at fáa innlit í kappingarviðurskiftini innan ávísan marknað. Tað er ein treyt fyri at byrja eina marknaðargreining, at Kappingareftirlitið frammanundan hevur ábendingar um, at tað eru viðurskifti ella framferð á einum marknaði, sum forða, avlaga ella hava aðra skaðiliga ávirkan á kappingina til skaða fyri samfelagið. Talan er ikki um beinleiðis prógv, men heldur um viðurskifti ella framferð, sum búskaparfrøðiliga vanliga verða tulkað sum tekin um marknaðir við kappingarligum avbjóðingum.

Ásetingin nevnir dømir sum høgar prísir, høgan vinning, høga miðsavning og avmarkað atgongd til ein marknað. Talan kann eisini verða um onnur viðurskifti.

Við ásetingini fær Kappingareftirlitið heimild til at kanna hvørjar orsøkir eru til, at kappingin ikki er virkin á viðkomandi marknaði og seta í verk tiltøk, sum kunna hjálpa ella loysa trupulleikan.

Kappingareftirlitið ger vegleiðing um, hvussu marknaðargreining fer fram.

Ásetingin fevnir um fyritøkur o.a., sum kann vera ein fyritøka, ein samtøka ella samskipan av fyritøkum, løgfrøðiligur ella likamligur persónur o.a.

§ 29 a, stk. 2
Ásetingin gevur Kappingareftirlitinum heimild at krevja og lata upplýsingar sambært § 28 í galdandi kappingarlóg. Ásetingin áleggur samstundis fyritøkum, samtøku av fyritøkum og øllum løgfrøðiligum og likamligum persónum o.ø. skyldu at lata upplýsingar, sum verða kravdar sambært stk. 1. Í hesum sambandi er umráðandi at hava í huga meginregluna um sjálvákæru.

Tað er Kappingareftirlitið, ið avgerð, hvørjar upplýsingar eru neyðugar til tess at røkja skylduna. Um so er, at talan er um revsiverd viðurskifti, verður meldað til løgregluna, ið síðan hevur kanningarnar um hendi eftir rættargangslógini. Spurningurin um, hvørt upplýsingarnar, ið Kappingareftirlitið krevur, eru neyðugar, kann bert leggjast fyri rættin.

Um nakar tilætlað ella av grovum ósketni ikki eftirlíkar einum kravi frá Kappingareftirlitinum um upplýsingar, kann hetta sektast, sbrt. § 35, stk. 1, nr. 11.

Sambært § 28, stk. 3, hevur Kappingareftirlitinum heimild at krevja upplýsingar og atgongd til skjøl frá øðrum myndugleikum.

Sambært § 28, stk. 4, hevur Kappingareftirlitið heimild at innheinta upplýsingar sambært § 28, stk. 1, um Kappingareftirlitið skal hjálpa kappingarmyndugleikum, ið eru partar av norðurlendsku samstarvsavtaluni í kappingarmálum, at fremja og handhevja kappingarlógina í hesum londum.

§ 29 a, stk. 3
Ásetingin heimilar Kappingareftirlitinum at almannakunngera marknaðargreining, tó við teimum undantøkum, sum fylgja av § 22. Innan almannakunngerð hevur niðurstøðan av greiningini verið til ummælis hjá viðkomandi pørtum.

§ 29 a, stk. 4
Um marknaðargreining sambært stk. 1 vísir, at tað á viðkomandi marknaði er framferð ella viðurskifti, sum virka ímóti kappingini á viðkomandi marknaði, kann Kappingareftirlitið geva boð sambært § 26 í galdandi kappingarlóg við tí endamáli at steðga atferð ella viðurskiftum, sum eru til ampa fyri kappingina.

Sambært § 26 skulu boðini frá Kappingareftirlitinum standa mát við atferðina ella viðurskiftini, sum gera seg galdandi á einum marknaði, og sum forða, avlaga ella hava aðra skaðiliga ávirkan á kappingina til skaða fyri samfelagið. Talan er um eina ítøkiliga meting, og boðini skulu vera hóskandi og rímilig sambært meginregluni um proportionalitet. Boðini í § 26, nr. 1-4, eru ikki úttømandi.

Við ásetingini fær Kappingareftirlitið m.a. heimild at geva boð um, at farast kann ikki upp um ásettar prísir ella vinningar.

§ 29 a, stk. 5
Við ásetingini verður heimilað Kappingareftirlitinum at enda eitt mál eftir § 27 í kappingarlógini, tá ið fyritøka o.a. hevur givið tilsøgn, sum Kappingareftirlitið hevur gjørt bindandi – varandi ella tíðaravmarkað.

Ásetingin heimilar samstundis Kappingareftirlitinum at geva boð sambært § 27, stk. 2 og 3, til tess at tryggja, at latin tilsøgn verður fylgd til fulnar og innan ásetta tíð. Um ósemja er um tulking av einari tilsøgn, kann Kappingareftirlitið taka avgerð um, at fyritøkan sum hevur latið tilsøgnina, skal virka á ávísan hátt og innan ávísa freist fyri at tryggja, at tilsøgnin sum fyritøkan hevur latið, verður fylgd. Kappingareftirlitið kann eisini geva slík boð, hóast møgulig freist at fylgja tilsøgnini ikki er farin.

§ 27, stk. 3, nr. 1-2, heimilar Kappingareftirlitinum at afturkalla eina tilsøgn eftir § 27, stk. 1. Afturkall kann skyldast, at veruligu viðurskiftini, sum høvdu týdning fyri avgerðina, eru broytt, at avtalupartarnir ikki hava gjørt eftir boðum, ella at avgerðin er tikin við støði í skeivum ella villleiðandi upplýsingum frá avtalupørtunum. Um Kappingareftirlitið metir tað vera í samsvari við meginregluna um proportionalitet at afturkalla eina avgerð eftir stk. 1, merkir hetta, at tey ivamál, sum Kappingareftirlitið hevði at byrja við framvegis eru galdandi, og tí kann væntast, at Kappingareftirlitið fer at taka nýggja avgerð.

Víst verður samstundis til viðmerkingar til § 27.

Til § 1, nr. 4

§ 33, stk. 4
Ásetingin ger greitt, at avgerð tikin av Føroya Kærustovni kann bæði av kærara, t.e. fyritøka o.a., og Kappingareftirlitinum leggjast fyri Føroya Rætt.

Til § 1, nr. 5

§ 33, stk. 5
Ásetingin ger greitt, at Kappingareftirlitið er sokallaði prosessparturin, tá ið avgerð verður løgd fyri Føroya Rætt. Tað merkir, at tá ið kærari, t.e. vanliga fyritøka o.a., leggur avgerð tikin av Føroya Kærustovni fyri Føroya Rætt, verður Kappingareftirlitið - og ikki Føroya Kærustovnur - stevnt. Somuleiðis verður lagt upp til, at tá ið Kappingareftirlitið leggur avgerð fyri Føroya Rætt, verður fyritøkan o.a. stevnd.

Til § 1, nr. 6

§ 35, stk. 1, nr. 11
Til tess at Kappingarmyndugleikin kann fáa atgongd til tær í § 28, stk. 1-3 nevndu upplýsingar, verður við hesari ásetingini ásett heimild at revsa við sekt tann, sum tilvitað ella av grovum ósketni ikki gevur Kappingareftirlitinum upplýsingar, sum eftirlitið hevur heimild at krevja sambært § 28, stk. 1-3, tá ið Kappingareftirlitið fremur kanningar sambært § 29 ella marknaðargreiningar sambært § 29 a.

Til § 2
Lagt verður upp til, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 18. desember 2023

Høgni Hoydal
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Vinnuhúsinum